# UMSÓKN UM NAVNABROYTING

***Umsóknin skal sendast til:***

***Umhvørvisstovan, Traðagøta 38, Postboks 2048, FO-165 Argir***

***Fulla navn umsøkjarans o.a.***

______________________________________________

Fornøvn

______________________________________________

Millumnavn Eftirnavn

______________________________________________

Bústaður (gøta og býur/bygd)

____________________ ____________________

Føðingardagur Ríkisborgaraskapur

______________________________________________

Borgarastøða (giftur, ógiftur, annað)

***Fulla navn umsøkjarans aftaná ætlaðu navnabroytingina:***

______________________________________________

***Dagfesting og undirskrift:*** ______________________________

***Undirskrift hjá barni yvir 12 ár:*** ______________________________

***Um Umhvørvisstovuni tørvar aðrar upplýsingar í sambandi við umsóknina, kann ringjast til:***

***Navn:***______________________________________________

***Telefonnummar:*** ____________________

***Teldupostur:*** ______________________________

***Orsøkin til umsóknina um navnabroytingina, nærri frágreiðing um navnið og tilknýtið umsøkjarans til navnið:***

***Hesin teigur skal bara fyllast út, um so er at søkt er um navnabroyting áður.***

***Hevur umsøkjarin/umsøkjararnir fingið navnabroyting áður?*** ☐ ja ☐ nei
Prógv fyri møguligari navnabroyting skal leggjast við.

***Er áður søkt um navnabroyting, sum ikki varð játtað?*** ☐ ja ☐ nei
Noktandi svarið skal leggjast við.

***Hetta skal leggjast við fyri allar umsøkjarar:***

**1.** Dóps- ella navnaváttan

**2.** Vígslubræv fyri giftar persónar. Umsøkjarar, ið eru sundurlisnir/skildir og ikki uppafturgiftir, skulu leggja sundurlesingar- ella skilnaðarváttan við. Einkjumenn/einkjur, sum ikki eru uppafturgift, skulu leggja deyðsváttan fyri hjúnafelagan við.

**3.** Skjalprógv fyri navnabroyting, sum møguliga er fingin áður.

**4.** Avrit av kvittan fyri gjald, um so er, at gjald skal rindast fyri navnabroytingina, sí hjáløgdu §§ 14-17 í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn við seinni broytingum. *Gjald fyri navnaprógv verður goldið á kontu hjá* **Føroya Gjaldstovu***, viðmerkt ”navnaprógv”. Allir peningastovnar taka ímóti hesum inngjaldingum, teir kenna kontonummarið hjá Gjaldstovuni.* ***Gjaldast kann eisini ígjøgnum netbanka á konto: 6460 – 260.005.8.*** *Minst til at viðmerkja: 128804-6210-1000. Gjaldið verður afturgoldið, um umsóknin ikki verður gingin á møti.*

***Legg til merkis:***

- *Giftir persónar:* Ein umsókn um navnabroyting fevnir ikki um hjúnafelagan, uttan so at tað er viðmerkt í umsóknini.

- *Børn:* Hevur umsøkjarin foreldramyndugleikan yvir ógiftum børnum ella ættleiddum børnum undir 18 ár, skal upplýsast, hvørt umsóknin eisini skal fevna um børnini. Eru børnini fylt 12 ár, skulu tey skrivliga taka undir við umsóknini.

- *Sama navnabroyting fyri fleiri fólk í senn:* Neyðugt er at fáa gjøllar upplýsingar um hvønn einstakan umsøkjara. Síða 4 og 5 kunnu tá nýtast til hetta. Er talan bert um tann eina umsøkjaran, skal hyggjast burtur frá síðu 4 og 5.

***Upplýsingar um og undirskriftir frá hinum umsøkjarunum, um fleiri skulu hava somu navnabroyting í senn:***

***Fulla navn umsøkjarans v.m.***

________________________________________________________________________

Fornøvn

____________________________________ ____________________________________

Millumnavn Eftirnavn

________________________________________________________________________

Bústaður (gøta og býur/bygd)

________________________ __________________________________

Føðingardagur Ríkisborgaraskapur

_____________________________________________________________________

Borgarastøða (giftur, ógiftur, annað)

***Fulla navn umsøkjarans aftaná ætlaðu navnabroytingina:***

________________________________________________________________________

***Dagfesting og undirskrift:*** ________________________________________________

***Undirskrift barn yvir 12 ár:*** ________________________________________________

***Fulla navn umsøkjarans v.m.***

____________________________________________________________

Fornøvn

______________________________ ______________________________

Millumnavn Eftirnavn

____________________________________________________________

Bústaður (gøta og býur/bygd)

________________________ ______________________________

Føðingardagur Ríkisborgaraskapur

____________________________________________________________

Borgarastøða (giftur, ógiftur, annað)

***Fulla navn umsøkjarans aftaná ætlaðu navnabroytingina:***

____________________________________________________________

***Dagfesting og undirskrift:*** ________________________________________

***Undirskrift barn yvir 12 ár:*** ________________________________________

# Gjald fyri navnaprógv o.a.

## Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn við seinni broytingum

### Kapittul VI
### Gjald fyri navnaprógv o.a.

**§ 14.** Fyri navnaprógv verður latið eitt gjald uppá kr. 1.000,- til landskassan. Gjaldið verður latið samstundis, sum umsókn um navnaprógv verður send landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Fevnir umsóknin um fleiri persónar, verður latið gjald fyri hvønn teirra.
*Stk. 3.* Tó skal bert latast eitt gjald, um umsóknin fevnir um:

1) hjún,
2) systkin undir lógaldri ella
3) foreldur og børn teirra, sum eru undir lógaldri.

*Stk. 4.* Viðvíkjandi stjúk- ella fosturbørnum verður fyriskipanin í stk. 3 um systkin og børn undir lógaldri nýtt samsvarandi.
*Stk. 5.* Verður navnaprógv ikki givið, verður gjaldið afturrindað umsøkjaranum/ umsøkjarunum.

**§ 15.** Gjald verður ikki latið fyri navnaprógv til barn, um umsóknin er send landsstýrismanninum innan 6 mánaðir eftir, at barnið er føtt, ella innan 6 mánaðir eftir, at barnið er ættleitt.

**§ 16.** Fólk, sum ikki eru skrásett í kirkjubók í Føroyum, ella ikki eru gift hjá einum myndugleika her á landi, men sum í aðrar mátar hava rætt til at broyta navn við fráboðan, kunnu við navnaprógvi frá landsstýrismanninum fáa loyvi at broyta navnið.
*Stk. 2.* Navnabroyting, ið kann loyvast við fráboðan - annaðhvørt til skrásetingarmyndugleikan ella vígslumyndugleikan - kann eisini loyvast við navnaprógvi í sambandi við, at navn verður broytt við heimild í § 5, stk. 2, §§ 10 og 11.
*Stk. 3.* Einki gjald verður latið fyri navnaprógv sambært stk. 1.

**§ 17.** Einki gjald verður latið fyri navnaprógv við heimild í § 11, stk. 1, nr. 4.